LØGBITI NR. 5

# LÓGGÁVA Í MUN TIL KOMMUNURNAR

LÓGARTÆNASTAN

2. útgáva - oktober 2025

# Løgbitar

Ætlanin við løgbitunum er stutt at lýsa nøkur yvirskipað løgfrøðilig ella faklig evni, sum tað er gott at hava sum undirstøði, tá ein lóg ella aðrar rættarreglur skulu gerast.

Løgbitarnir eru eitt leiðbeinandi ískoyti til rundskrivið um lógarsmíð.

Løgbitarnir eru gjørdir í samráð við tey stjórnarráð ella myndugleikar, sum hava serligan kunnleika innan økið, sum løgbitin viðvíkur.

Nella Festirstein
Deildarstjóri á lógartænastuni

**Løgbiti nr. 5**

# Lóggáva í mun til kommunurnar

## 1. Løggildisgrundreglan

Kommunurnar er fevndar av vanligu løggildisgrundregluni. Hetta merkir, at tær uppgávur, sum kommunurnar hava ábyrgd av, skulu hava heimild í lóg, og at røktanin av hesum uppgávum má ikki stríða móti nakrari lóg.

## 2. Sjálvstøðuga støðan hjá kommununum

Sjálvstøðuga støða hjá kommununum sæst í stýrisskipanarlógini § 56 (Grundlógini § 82), har tað er ásett, at rættur kommunanna at skipa egin viðurskifti undir eftirliti landsstýrisins verður ásettur í løgtingslóg, m.a. í hvønn mun kommunur og millumkommunufelagsskapir kunnu skuldbindast við láni, borgan o.ø.m.

Kommunur eru sjálvstøðugar eindir og eru fyrisitingarliga ikki undirgivnar landinum. Tað merkir m.a. at bindandi regulering av virkseminum hjá kommununum einans kann gerast við lóg ella við heimild í lóg. Er ongin heimild, kann tað ikki við bindandi virknaði regulerast í viðurskiftum hjá kommununum.

## 3. Serligt viðvíkjandi kæru

Av tí at tað eru ikki nøkur yvir-/undirskipanarviðurskifti millum landsfyrisitingina og kommunurnar, eru avgerðir, sum kommunurnar taka mótvegis borgarunum, endaligar innan fyrisitingina. Skal ein avgerð kunna kærast til landsstýrisfólki, skal hetta verða ásett beinleiðis í løgtingslógini.

## 4. Skyldan hjá kommununum

Er tað í løgtingslóg álagt kommununum at røkja eina uppgávu, hava kommunurnar skyldu at fylgja løgtingslógini og kunnu ikki sleppa sær undan hesi uppgávuni. Tað kann t.d. eisini verða ásett í lóg, at ein kommuna ikki kann átaka sær ávísar uppgávur.

Eisini kann tað í løgtingslóg verða ásett, hvussu ein uppgáva skal røkjast. Í hesum førum skal havast í huga, at ásetingar um, hvussu ein uppgáva skal røkjast, skerja frælsið hjá kommununum til sjálvar at leggja til rættis, hvussu uppgávan best verður røkt í mun til staðbundin viðurskifti og raðfestingar.

## 5. Kommunustýrislógin o.a.

Rættarligu karmarnar fyri kommunurnar er løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri (Kommunustýrislógin). Í løgtingslógini er ásett, hvussu kommunurnar

verða skipaðar, hvussu avgerðir verða tiknar, og at kommunustýrið er ovasti myndugleiki fyri øll viðurskifti í kommununi. Innlitslógin, fyrisitingarlógin og dátuverndarlógin er eisini galdandi fyri kommunurnar.

## 6. Kommunala eftirlitið

Kommunala eftirlitið avgreiðir fyrispurningar og klagur um ymisk kommunal viðurskifti. Talan er um eitt rættargildiseftirlit, sum hyggur eftir, at galdandi lóggáva verður hildin. Eftirlitið kann m.a. snúgva seg um innihaldið/løggildið í kommunalum avgerðum, ymiskar mannagongdir sambært kommunustýrislóggávuni, heimildir hjá kommunustýrunum og uppgávur teirra. Eftirlitið hevur fyrst og fremst eftirlit við kommunustýrinum sum fyrisitingarligur myndugleiki og ikki sum privatrættarligur partur ella sum arbeiðsgevari.

Tað, sum eyðkennir rættargildiseftirlitið, er, at tað kann verða framt av sínum eintingum. Hetta merkir, at eftirlitið ikki er treytað av einhvørjum skumpi uttanífrá, men kann fara til verka av sínum eintingum. Kommunala eftirlitið hevur einans týdning í teimum førum, at kommunustýrið er endaligur fyrisitingarmyndugleiki.

Rættargildiseftirlitið við kommununum er hjá landsstýrisfólkinum í kommunumálum, meðan fíggjarliga eftirlitið við kommununum er hjá landsstýrisfólkinum í fíggjarmálum.

## 7. Kommunufulltrúin. Allýsing og innihald

Sum nevnt omanfyri eru kommunurnar fevndar av vanligu løggildisgrundregluni. Kommunur kunnu tó fara undir ymisk tiltøk av fíggjarligum slag við heimild í kommunufulltrúini. Rættarliga heimildin undir kommunufulltrúini er ikki onnur enn, at kommunan er eitt lokalt samfelag, ið kann krevja skatt frá sínum borgarum og tí hevur sítt egna fíggjarliga grundarlag.

Kommunufulltrúin heimilar ikki inntriv í rættarstøðuna hjá borgarum, sum eitt nú at seta forboð ella krøv. Kommunufulltrúin heimilar heldur ikki, at undantak ella líknandi verður givið fyri tí, sum er ásett við lóg. Heldur heimilar kommunufulltrúin, at farið verður undir tiltøk av fíggjarligum slag uttan lógarheimild, so sum at veita borgarum á staðnum ávísar tænastur.

## 7.1. Kommunalur áhugi og almannagagn

Tá ið ein kommuna fer undir eitt virksemi við heimild í kommunufulltrúini, er tað vanlig fatan, at virksemið eigur at koma einum breiðum skara av borgarum til góðar. Um ætlanin er at sæta einstaklingum ella ávísum bólki av borgarum, krevst heimild í lóg, og tá er kommunufulltrúin sum meginregla ikki nóg góð heimild. Virksemið, sum farið verður undir, skal eisini hava kommunalan áhuga, tvs. at virksemið skal tæna felags áhugamálum í staðbundna økinum. Talan er aloftast um, at kommunan veitir borgarum á staðnum tænastur.

Dømi um á hvørjum økjum, ein kommuna kann fara undir tiltøk við heimild í kommunufulltrúini, eru vegarbeiði, staðbundið busssamband, ítróttar- og mentanartilboð, kvøldskúlar, karmar fyri vinnuna á staðnum, ferðavinnu o.a.

## 7.2. Avmarkingar

Ein kommuna kann bara átaka sær uppgávur við heimild í kommunufulltrúini, um uppgávan hevur áhuga fyri borgarar í viðkomandi kommunu. Kommunur kunnu eitt nú ikki stuðla uppgávum, ið bert ella í mestan mun hava áhuga fyri borgarar í øðrum kommunum.

Ein kommuna kann sum meginregla ikki stuðla virksemi, sum hoyrir til landið. Sum dømi kann nevnast lóggávuøkið, løgreglan, uttanríkismál o.a. Tað er tó møguligt hjá kommunum at taka sær av ella stuðla virksemi, sum er ein uppgáva hjá landsmyndugleikum, um kommunalur áhugi er til tað.

Ikki er loyvt at stuðla einstaklingum ella bólkum av borgarum við heimild í kommunufulltrúini. Tó kann kommunalur stuðul veitast í ávísum førum, um kommunali áhugin er í miðdeplinum. Tá ið ein kommuna veitir stuðul, skal stuðulin lutfalsliga vera í samsvari við kommunala áhugan.

Ein kommuna kann ikki fara undir eitt virksemi við heimild í kommunufulltrúini, um virksemið hevur fíggjarligan vinning fyri eyga.

Eftir vanligum almennum rættaraðalreglum viðvíkjandi kommunalum uppgávum er tað ikki ein kommunal uppgáva at reka handil, handverk, ídnað ella fíggjarligt virksemi uttan so, at lógarheimild er fyri hesum. Tað finnast tó undantøk:

**Framleiðsla til egið brúk**
Kommunur kunnu framleiða vørur og tænastur, ið eru knýttar at teimum uppgávum, sum kommunan sambært lóg ella kommunufulltrúini hevur átikið sær. Tað má tó ikki vera nógv dýrari at framleiða hjá kommununi, enn um kommunan keypti vøruna ella tænastuna frá privatum.

**Hjáframleiðsla**
Kommunur kunnu selja vørur, ið eru hjáframleiðsla av eini annars lógligari kommunalari uppgávu. Hjáframleiðslan skal vera ein natúrlig, tilvildarlig og óumberlig avleiðing av eini lógligari kommunalari uppgávu.

**Avlop**
Kommunur kunnu í vissan mun gagnnýta tað avlop, sum stendst av eini annars lógligari kommunalari uppgávu.

**Hjávirksemi**
Kommunur kunnu í avmarkaðan mun røkja hjávirksemi, sum í sjálvum sær fellur uttan fyri kommunufulltrúina, men sum hevur tætt og natúrligt tilknýti til lógligt kommunalt virksemi. Kommunan kann tó bert eiga slíkt virksemi, ikki reka.

## 7.3. Tá ið lóggivið verður innan fyri kommunufulltrúina

Kommunufulltrúin sæst aftur og er ment í siðvenjuni, og hon víkir fyri tí skrivaðu lógini. Lóggávan kann eitt nú seta avmarkingar í mun til, hvat ein kommuna kann og ikki kann fara í holt við. Um eitt øki, sum annars er fevnt av kommunufulltrúini, verður ásett við lóg, skal havast í huga, um talan er um tømandi ásetingar. Tílíkar ásetingar kunnu føra við sær, at kommunufulltrúin ikki verður galdandi framyvir.

Tað hevur týdning at lýsa sambandið millum kommunufulltrúina og lógaruppskotið í viðmerkingum til uppskotið, um lógaruppskotið avmarkar ella víðkar heimildirnar hjá kommununum í mun til kommunufulltrúina.